# Ver›a ta› ein ella tveir

*Stóri spurningurin frá føroyskari sí›u tykist vera, hvussu Allan Simonsen fer at sera føroyska álopspartin saman*

JÁKUP MØRK/ÁLVUR HARALDSEN ZÜRICH

Landsli›svenjarin, Allan Simonsen, er vanliga ikki ma›urin, sum fremur tær stóru taktisku broytingarnar, men í kvøld ver›ur so undir øllum umstø›um talan um eina broyting.


*Allan Simonsen hevur enn ikki gjørt av, hvussu føroyska li›i› fer at síggja út*

## Ein ella tveir

Todi Jónsson er sum kunnugt ikki tøkur til uppgávuna hesu fer›, og spurningurin er so, hvussu álopskortini ver›a blanda›.

Eftir venjingunum higartil at døma, kann talan gerast um tveir møguleikar, og er stóri spurningurin í hesum sambandi, hvørt venjarin velur at spæla vi› einum ella tveimum áleyparum.

Ver›ur talan um tveir áleyparar, er upplagt, at Kurt Mørkøre kemur á plássi› hjá Toda. Hetta merkir so eisini, at talan tá ver›ur um vanligu føroysku 3-5-2 spæliskipanina, og fer li›i› tá helst at síggja solei›is út.

Jákup Mikkelsen ver›ur í málinum, me›an verjan ver›ur manna› vi› Hans Fró›a, Jens Kristiani og Óla. Á mi›vøllinum eru tá (nevndir úr høgru) Allan Mørkøre, Julian Johnsson, Sámal Joensen, John Petersen og Øssur Hansen, me›an Kurt og Uni taka sær av bá›um álopssessunum.

Hinvegin kann eisini vera, at Allan Simonsen setir lei›i› meira verjukent, nú Todi ikki er tøkur. Ver›ur hetta gjørt, eru ta› kanska serliga tvær orsøkir, sum gera seg galdandi.

Onnur er, at Uni og Kurt eru rættiliga líkir sum áleyparar, og at venjarin tí kanska metir, at ta› er best at n‡ta teir hvør sær. Hin orsøkin er, at Allan Simonsen nú kann gerast noyddur at vísa, hvørjar ætlanir hann hevur vi› úttøkuni av Johan Byrial Hansen. Hann hevur neyvan tiki› ein 25 ára gamlan leikara, sum er um at bíta seg fastan í superliguni, út, bert tí hann skal sleppa at sita á beinkinum.

Ver›ur hann settur inn li›i›, ver›ur Allan Mørkøre helst fluttur nærri mi›juni, me›an John Petersen so ver›ur hangandi áleypari aftan fyri Una Arge.

Alt hetta eru tó bara gitingar og hypotesur, og møguleikin fyri, at landsli›svenjarin ger okkurt heilt anna›, er sjálvandi eisini til sta›ar, men kl. 16.30 okkara tí›, eru vit helst øll vor›in naka› klókari.

## Sveisiska li›i›

Uttan at fara alt ov nógv í smálutir, so kann roknast vi›, at heimali›i› fer at ver›a ógvuliga framrætta›, tá teir fara á vøllin í dag.

Hópurin av fjølmi›lafólki hevur fylgt føroysku venjingunum, og av hesum skilst, at landsli›svenjarin ætlar sær at n‡ta tríggjar áleyparar móti Føroyum. Eisini tí Sveis tapti fyrsta dystin í undankappingini, og tí meira enn annars er noytt at vinna dystin, um vónin fyri luttøku í HM skal varveitast.

Móti russlandi vænta›ur tveir av kendastu og vandamestu sveisisku áleyparunum, men móti føroyingum eru hesir so aftur til rei›ar at tørna út.

Naka› av rumbli hevur veri› í sveisisku venjingarleguni, har ósemja hevur veri› millum leikarar og venjaran, men kortini ver›ur rokna› vi›, at byrjunaruppstillingin hjá Sveis ver›ur solei›is: Pascal Zuberbühler – Badile Lubamba, Stephane Henchoz, Marco Zwyssig, Sebastian Fournier – David Sesa, Ciriaco Sforeza, Fabio Celestini, Alexandre Cornisetti – Stephane Chaupisat, Kubilay Turkilmaz.

Á pappírinum ein 4-4-2, men sum skilst á fjølmi›lafólkunum er ta› í veruleikanum ein 4-3-3, tí David Sesa, vanliga er áleypari, og kemur allarhelst at hava sera leysar teymar á mi›vøllinu.

Hvørt hetta ver›ur nóg miki› til at knógva føroysku knassunum, vita vit øll nógv betur um hálvgum sjey tí›ina leygardagin.





*Enn hevur Allan Simonsen ikki bo›a› frá, hvørjir byrja inni, men Kurt sigur seg ikki vera vónsviknan, um hann ikki ver›ur millum teir fyrstu ellivu*




*Fáa vit ein javnleik móti Sveis, eri eg sera væl nøgdur, sigur Jens Kristian Hansen*

# Langt ár hjá li›formanninum

*Eftir venjingina hóskvøldi› fingu vit or›i› á føroyska li›skiparan, Jens Kristian Hansen*

JÁKUP MØRK/ÁLVUR HARALDSEN ZÜRICH

At Allan Simonsen ofta ver›ur rokna›ur fyri at vera óguvliga vanabundin, tykist eisini vera sjón fyri søgn, tá vit tosa vi› føroyska li›skiparan, Jens Kristian Hansen, um komandi uppgávuna og fyrireikingarnar til hesa.

– Fyrireikingarnar hava at kalla veri› tær somu, sum tær hava veri› seinastu 5-6 árini. Vit eru savna›ir einar tríggjar dagar á›renn dystin, so hevur vanliga venjingin veri› á skránni.

Spurdur, hvørt nakrar serliga taktiskar snildir hava veri› á skránni undir venjingunum, sigur Jens Kristian, at ta› hevur ta› fyri so vítt ikki.

– Venjingin er hin sama, sum hon altí› hevur veri›, og ta› ger sum so einki, tí vit akkurát, hvussu ymsu dagarnir ganga. Fríggjadagin rokni eg vi›, at vit hava eina fríløtu, og tá fara vit so vanliga ein túr í b‡in. Ta› dámar okkum tó eisini væl, tí tá kann man líka sum kobla frá eina løtu, og hugsa um okkurt heilt anna› enn fótbólt.

## Langt kappingarár

Um Jens Kristian er mó›ur, tá dysturin í kvøld er li›ugt leiktur, man ta› tó vera honum væl unt, at hann eftir hetta fær fótbóltsfrí í nakrar mána›ir.

– Eg hev›i ein ste›g í oktober mána›i í fjør, men annar havi eg vant nú í hálvt anna› ár út í eitt. Ta› sigur seg sjálvt, at man ver›ur eit sindur slitin, tá so er, og eg havi eisini drigist vi› ein ska›a í lærkrikanum seinastu vikurnar, men ta› gongur nokk í hálvfems minuttir afturat, heldur hann.

– Eg sleppi jú at hvíla meg í nakrar mána›ir aftan á dystin, so man klárar altí› at bíta tenninar eitt sindur saman og spæla dystin.

## Stórur missur

Ta› hevur sermerkt li›i› eitt sindur hesu fer›, at tveir n‡ggir mans eru í hópinum hjá Allani Simonsen, sum annars ikki plagar at gera tær stóru broytingarnar. Li›forma›urin heldur tó ikki, at ta› er so ógvuliga merkisvert.

– Nei, teir hava bá›ir veri› upp á tal í eina tí›, so ta› hev›i man kanska rokna› eitt sindur vi›. At so bá›ir koma í hópin samstundis er eisini tí, at ska›ar hava gjørt um seg. Ta› er tó eitt sindur yvirraskandi, at hann hevur tiki› tveir áleyparar út, tí avbo›ini eru jú komin frá bæ›i mi›vøllinum og álopinum, men kanska er hetta eitt tekin um, at Allan Simonsen ætlar sær at spæla meira framrætta› enn vanligt, sigur Jens Kristian. Hann leggur tó afturat, at enn hevur venjarin so onga ábending givi› um, hvussu spæliætlanin ver›ur.

Annars er Jens Kristian samdur í teimum, sum halda, at missurin av Toda Jónsson í álopspartinum er stórur.

– Sjálvandi er hann ta›. Todi er jú vanliga besta álopskort okkara, og vi› skjótleika sínum megnar hann altí› at binda ein ella tveir av verjuleikarunum hjá mótstø›uli›num. Vit hava tó á›ur s‡nt, at vit eisini kunnu spæla gó›ar dystir, tá hann ikki er vi›, men ta› merkist sjálvsagt. Rættiliga stórur partur av álopsspæli› okkara gongur jú eisini ígjøgnum Toda, men nú hann ikki er tøkur, mugu vit bara prógva, at vit kortini hava eitt gott li›.

At enda spurdu vit so eisini, hvørjar vónir li›forma›urin hevur til dystin og ikki minst úrsliti› av dystinum í kvøld.

– Ta› er altí› ringt at gita um úrslit, men høvdu vit megna at spælt javnt, hev›i eg veri› fantastiska væl nøgdur.

# Málkongurin hopar ta› besta

*Kurt Mørkøre hevur sett met í Sogndal, har málini í fullari fer› er farin inn í kontina*

JÁKUP MØRK/ÁLVUR HARALDSEN ZÜRICH

Ein hin størsti spurningurin, nú Todi Jónsson ikki fær veri› vi›, er hvussu Allan Simonsen fer at manna føroysku álopssessirnar.

Onkur hevur hildi›, at Uni Arge byrjar einsamallur á toppinum, me›an onnur halda, at landsli›svenjarin, eins og vanligt, fer at hava tveir mans frammi, og at um so er, ver›ur ta› Kurt Mørkøre, sum fær álopssessin vi› sí›una av Arge manninum.

## Allan ger av

Sjálvur tykist Kurt Mørkøre tó als ikki at hugsa naka› serligt um, hvørt ta› ver›ur til eitt pláss millum teir fyrstu ellivu ella ikki.

– Nei, ta› havi eg so avgjørt ikki gjørt mær nakrar tankar um, so ta› er bara Allan Simonsen, sum veit, hvussu ver›ur vi› tí, helt Kurt fyri, tá vit spurdu hann, um byrjunarsessurin nú er naka› nærri.

– Eg havi heldur ikki fingi› nakrar sum helst ábendingar um, hvussu Allan ætlar at seta li›i›. Eg kann tó leggja afturat, at eg heldur ikki veri› vónbrotin, um so er, at eg byrji á beinkinum.

– Sjálvandi vil eg sleppa at spæla, men ta› er so bara venjarin, sum avger hetta.

## Vant nógv

Skal metast eftir venjingarstø›uni, er tó einki til hindurs fyri, at veteranurin ver›ur millum teir fyrstu ellivu, tá fari› ver›ur á vøllin í dag.

– Vit hava vant vi› fullari fer› sí›ani februar mána›, so eg eri kanska eitt sindur eymur í beinunum, men hinvegin haldi eg eisini, at eg í løtuni eri sera væl fyri.

– Í vetur vandu vit 11 fer›ir um vikuna, me›an ta› nú hevur veri› átta fer›ir um vikuna, og hetta er naka›, sum merkist. Fram til eg var tredivu, vandi eg bara tríggjar fer›ir um vikuna, men hetta hevur so eisini vi›ført, at formurin er betri, enn hann nakran tí› hevur veri›.

Og júst formurin heludr hann eisini er orsøkin til, at ta› hevur gingi› honum somiki› væl í Noreg, har hann nú hevur sett málmet í felagnum. Gamla meti› upp á 16 mál í einum kappingarári átti Tore Andre Flo, so ta› sigur seg sjálvt, at Kurt er væl dámdur í b‡num.


*Super-Kurt, sum tey í Sogndal rópa hann, hevur í ár sett n‡tt met hjá felagnum. Gamla meti› átti Tore-Andre Flo*

– Li›i› hjá okkum er ungt, og talan er um fleiri gó›ar spælarar. Sjálvur eri eg so millum teir eldru, men ta› hevur so gingi› framúr væl hjá mær. Ta› byrja›i beinan vegin at koma mál á kontina, og sí›ani hevur ta› bara gingi› vi› fullari fer›.

Og er hetta so eisini naka›, sum fólkini í b‡num leggja merki til?

– Ja, ta› er so heilt sikkurt. Sogndal er ein lítil b‡ur, har ta› bert eru eini 5.000 fólk, solei›is at øll líkasum kenna hvønn annan. Hetta ger so eisini, at fleiri teirra ste›ga á fyri at práta, og tá so er, stendur fótbólturin sjálvandi ovarliga.

Hetta má sigast at vera ein n‡ggjur leiklutur hjá áleyparanum, men sjálvur tykist hann tó einki at hava ímóti hesum.

– Nei, hetta er bara heilt stuttligt, og vónandi heldeur gó›ar gongdin fram tey bæ›i árini, sum eg havi eftir av sáttmálanum.

## Toppa í løtuni

Spurdur, hvørjar vónir hann hevur um dystin í dag, sigur Kurt, at vónirnar eru gó›ar.

– Eg haldi, at vit í løtuni hava eitt sera gott li›. Aldurin hjá teimum flestu leikarunum liggur um 27-28 ár, so talan er um royndar leikarar, sum í løtuni eru upp á sítt allarbesta.

– Hetta merkir tó eisini, at bestu úrslit okkara eiga at koma nú í hesi undankappingini. Rutinan og aldurin tala fyri, at vit toppa júst í hesi undankappingini, so ta› ver›ur spennandi at vita, hvussu langt hetta røkkur hjá okkum.

Men merkir ta› so eisini, at føroyingar ikki longur eru vi› fyri at læra?

– Ja, hatta er so avgjørt ein farin tí›, ella ta› átti ta› undir øllum umstø›um at veri›, sigur Kurt Mørkøre at enda.